## Várskeið í Kvøldskúlanum

Tórshavnar Kvøld-, ungdóms- og listarskúli bjóðar nýggj skeið fram í næstum, og enn eru pláss eftir til skeiðini "Kreativ maskinbroderí ", "Lívsdygd á ellisárum" og "Persónlig vælvera og røkt". Nærri kunning um skeiðini og tilmelding er at lesa niðanfyri ella á heimusíðuni www.kvoldskulin.fo .




## 5% arbeiðsloysi í november

Arbeiðsloysið var 5,0 prosent í november, og er hetta er ein vøkstur uppá 0,6 prosent stig. Árstíðarjavnaða arbeiðsloysið í november var 5,1 prosent. 796 mannfólk og 593 konufólk vóru fulltíðararbeiðsleys í november. Størsta arbeiðsloysið er í Norðoyggjum. Arbeiðsloysið vaks í øllum sýslum í oktober, uttan í Vága Sýslu har arbeiðsloysið stóð í stað. Størsti vøksturin var í Suðuroy, har talið av arbeiðsleysum øktist við 21 prosentum í mun til oktober mánað, úr 162 fólkum uppí 206 fólk. Minsta arbeiðsloysið var í Eysturoy og Vága Sýslu. Uppgerðin vísir at arbeiðsloysið er størst millum tey 16–34 ára gomlu og tey ið eru 54 ár og eldri. Arbeiðsloysið vaks í øllum aldursbólkunum uttan hjá teimum ið eru eldri enn 54 ár.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndir: Jens Kristian Vang og Polfoto*

# dett nú ikki...




**Gummisóli við einum petti av grovum sandpappíri frá Jógvani Weihe.**

**Góða gamla loysnin við einum gomlum skóleisti ella hálvhosu út yvir skógv ella stivla. Kanska ikki so lekkurt endiliga, men loysnin forðar helst mongum frá reyvafalli í hálkuni. Skóleisturin liggur væl um ristina og fýkur ikki av í heilum.**

**Klassisi grøni Viking gummistivlin við skotsternuttum fóðri er bestseljarin hjá Andreasi í Vágsbotni í hálku. Hann hevur góðan botn við tjúkkum rípum, og hóskar væl, bæði í fjall og í fjøru. Eisini er hann favoritturin hjá harumonnum.**

**Tvey næstan eins sløg av gummisólum við metalsnirlum undir. Annað parið hevur velcroband upp um fótablaðið, sum fær alt at sita fastari á fótinum. Fæst hjá Siri.**